

Rúni saman við biologisku mammuni og eldra bróðurinum.



Tríggir brøður; frá vinstru Hyo Sung, ið er elstur, Rúni (Hyo Shik), ið er miðlingur og tann yngsti Tae Sung.



Ùtsýni frá Seoul Tower

# Feitt upplivilsi

Tvey ár eru skjótt liðin síðan Rúni Kim Petersen fekk bræv frá sínum biologisku foreldrum í Suðurkorea - tey vildu hava samband við hann. Nú hevur hann verið í Seoul, og hetta er tað feitasta upplivilsi, hann hevur havt, sigur Rúni

ÆTTLEIÐING
*Marjun Dalsgaard*

Fyrst var hann bara skelkaður - so byrjaði hann at hugsa um, um hann yvirhøvur skuldi skriva aftur - hvat vildu hesi fremmandu fólkini úr Korea? Hví skrivaðu tey nú? Nógvir spurningar trokaðu á, tá Rúni Kim Petersen fekk eitt bræv úr Korea í marts mánaði fyrra árið. Hansara biologisku foreldur vildu fegin hava samband við hann, og hann stóð brádliga við valinum um at fáa svar uppá allar teir spurningar, sum hann hevði gingið við sum ættleiddur. Nær var hann føddur? Hvør var til staðar? Hví varð hann ættleiddur? Rúni kendi seg ikki sørt ørkymlaðan av øllum hesum, men gjørdi av at svara brævinum - og síðan at síggja biologisku familjuna í Seoul.

Í dag hevur hann sæð tey - og tað var eitt feitt upplivilsi. Men tað var eisini hart - millum annað tí tað var ringt at tosa saman, tí tey duga ikki eingilskt og hann ikki koreanskt.



*Felagsmynd. Aftast frá vinstru: Pápi Rúna, Jaspur; ein vinkona hjá familjuni; Rúni; eldri biologiski bróðurin; ferðaleiðarin. Fremst frá vinstru: Terji, bróður Rúna; mamma Rúna, Jana; systir Rúna, Ása; biologiska mamman hjá Rúna, yngri biologiski bróður Rúna og presturin í kirkjuni, sum familian hoyrir til*

## Meira veruligt

Merkiligt, snedugt - dugi ikki at forklára tað, er svarið frá Rúna, um tú spyrt hann, hvussu tað var at síggja biologisku mammuna og brøðurnir fyrstu fer.

– Tað er ringt at seta orð á, men tað heila verður meiri veruleikakent. Nú er tað langt síðan, at eg fekk brævið, so eg havi vant meg við, at tey eru har, men at síggja tey gjørdi, at tey vórðu verulig, sigur Rúni.

Tá hann fekk brævið, hugsaði hann, at tað tómrúmið, sum hann altíð hevði kent, tí hann er ættleiddur, fór at fyllast út, um hann hitti hesi fólkini og fekk svar uppá teir spurningar, sum hann hevði havt, alt hann mintist. Hann hevur fingið svar uppá teir flestu av sínum spurningum, til dømis at hann varð ættleiddur, av tí at mamman og pápin livdu hvør sær, tá tey fingu hann sum nummar tvey, og hon megnaði ikki at breyðføða tveir dreingir. Tey komu síðan saman aftur, og hann hevur tískil ein yngri og ein eldri beiggja. Og nú er hetta tómrúm fylt út, sigur hann. Nú er hansara lívssøga fullkomin. Eitt varð tó, sum hann gjørdist keddur um, tá hann kom til Seoul. Tað var, at biologiski pápin var deyður fáar mánaðir áðrenn.

– Tað var eitt vónbrot ikki at síggja hann, men tað var fantastiskt at síggja hini kortini, sigur Rúni.

– Eg hevði ikki gjørt mær alt ov stórar vónir um, hvussu tað skuldi vera at hitta biologisku familjuna, mest fyri ikki at verða vónbrotin, men eg varð gleðiliga yvirraskaður. Tey vóru sera fitt og tóku sær væl av mær. Eg kendi meg eisini aftur í teimum í útsjónd og í atburði, sigur Rúni. Hann kom sera væl út av tí við yngra beiggjanum, sum hann eisini líkist mest av útsjónd.

– Tað var bara kemi – vit svinga væl saman, og tað var sum um, eg altíð hevði kent hann. Tann eldri beiggin dugdi ikki eingilskt, so vit kundu ikki tosa so nógv saman. Tann yngri dugdi einans onkrar glosur, men vit kundu so skriva seðlar og so framvegis, sigur Rúni.

## Foreldrini við

Rúni fór ikki einsamallur til Suðurkorea. Mamman, pápin, systurin og yngri beiggi hansara vóru við.

– Eg hevði nokk ikki fari einsamallur. Eg visti jú ikki, hvussu tað fór at vera. Eg ímyndaði mær í ringasta føri, at eg ikki hevði nakað felags við tey yvirhøvur, ella at eg kendi meg fremmandan hjá teimum – so hevði eg nokk kent meg eitt sindur einsamallan, um eg ikki hevði mína familju við mær, sigur Rúni.

– Bara tað, at tey vóru har, var ein stuðul - eg kendi meg eisini einsamallan, tá tey fóru heim, leggur hann aftrat. Hann var fyrst tveir dagar í Seoul saman við foreldrunum og systrini Ásu og yngra beiggjanum Terja. Hesar báðar dagarnar hittu tey biologisku familjuna hjá Rúna,





Koreanskur dansur í býnum Geyong Ju

og síðan fóru tey at ferðast runt í Suðurkorea við einum ferðaliði í 10 dagar. Við í ferðaliðnum vóru onnur, ið eru ættleidd úr Suðurkorea, men Rúni var tann einasti, sum visti, at hann skuldi hitta sína biologisku familju hendan túrin. Ein genta í ferðaliðnum fekk tó eina avtalu við sína familju í lag dagin eftir, at tey vóru komin. Tá hesir 10 dagarnir vóru farnir, fór familjan hjá Rúna og ferðaliðið aftur til Danmarkar, men hann var eftir og skuldi búgva hjá biologisku familjuni í eina viku.

– Tað var ringt tá, tí vit kundi jú ikki tosa saman. Vit høvdu ongan tulk nú, og tað einasta tey dugdu á eingilskum, vóru tær glosurnar, sum tann yngri beiggin dugdi - tað var sovorðið sum "Brother good?", sigur Rúni. Men tey kláraðu seg kortini - millum annað við at peika á kort og eina koreanska glosubok, greiðir hann frá - hetta førdi tó við sær, at tey kundu tosa í tímar, uttan at fáa so nógv at vita. Tað var somuleiðis nógv, sum hann ikki kundi spyrja um - tað var alt ov innviklað at forklára.

Hóast tey ikki kundi tosa so nógv, er Rúni glaður um, at hann hevur fingið møguleikan at hitta tey. Hann heldur somuleiðis, at tey vóru sera fegin um, at tey nú kunnu læra hann at kenna. Í fyrstani fekk hann tó eitt minni sjokk, tá hann spurdi, um tað var rætt, at hann var føddur 6. mars. Nei, var svarið - tú hevur føðingardag 17. januar.

– Eg var sera skakkur og hugsaði, at eg var endaður hjá skeivari familju, sigur Rúni. Tað vísti seg tó, at tað var ein misskiljing, tí tey hava eitt annað kalendaraár í Korea.

## Anonymur í Seoul

Tað undarligasta við ferðini var at kenna seg so anonyman, tá ein gekk á gøtuni, sigur Rúni. Hann fall inn í gøtumyndina í Seoul, og fekk ein kenslu av at vera heilt anonymur – ein kensla hann ikki hevur haft fyrr – hvørki í Føroyum ella í Keypmannahavn.

– Tú ert bara meira sjónligur her heima, um tú er ættleiddur úr Korea – soleiðis er tað bara – og tað var sera løgi, at eingi eygu festu seg á teg bara eitt sekund longur enn neyðugt, tá tú gekk á gøtuni í Seoul. Tá eg keypti, tosaðu tey eisini koreanskt við meg, sigur Rúni. Hann kendi seg sum ein part av býnum á tann hátt, men mentalt kendi hann seg sum ein gest.

– Mentalt eri eg føroyingur – sum hevur búð leingi í Keypmannahavn – tað er eingin ivi um tað, og eg eri glaður fyri, at eg eri uppvaksin her – eg hugsi um tað, eg standi fyri og so framvegis – tey hava eina heilt aðra mentan har, sigur Rúni.

Hann varð kortini sera glaður fyri Seoul, og kundi hugsa sær at búð har ein tíð. Hann hevur tó ikki avgjørt, nær hann fer yvir aftur – tað vil tíðin at vísa, sigur Rúni.



Tey høvdu eisini tíð til at ferðast – her við markið til Norðurkorea »Panmunjom»

## Brot úr dagbókini hjá Rúna

**Hyo Shik er koreanska navni hjá Rúna**
**Tea Sung er yngri biologiski bróðurin**
**Hyo Sung er eldri biologiski bróðurin**
**Biologiska mamman kallast Jang Shik og omma**
**Biologiski pápin kallast Jung Shik og appa**

*Søndag 10/8-2003*
*Sidder lige og tænker på, at det er i morgen, at jeg skal møde min familie, og har ikke den eneste sommerfugl i maven. Det er egentlig underligt (...)*

*Jeg sidder for mig selv ved siden af to fra Korea, og de stewardesser har talt koreansk til mig. Jeg har nok lignet et stort spørgmsålstegn, da jeg ikke fatter en brik af det, som bliver sagt. (...)*

*Det er sg'u mærkeligt at sidde i et fly, hvor alle er af samme race som jeg.*

*Vi sidder i bussen mod Seoul, og Don har talt med familien flere gange, fordi de vil være sikre på, at jeg er med. Han blabber et eller andet på koreansk, som jeg ikke forstår, og siger, at hun vil høre min stemme - OK..!*

*Mandag 11/8-2003*
*Kære Hyo Shik*
*Jeg er vågnet flere gange i nat, klokken fire, fem og seks og så kunne jeg ikke sove mere, sengen er meget hård, men jeg er nok nødt til at vænne mig til den.*

*Om tre timer skal jeg mødes med min biologiske familie, men jeg vil prøve, om jeg kan sove lidt mere (...)*

*Det kunne jeg ikke, så jeg stod op og gik i bad, så tænkte jeg, at jeg ville se mig omkring, hvor der ikke ville være så mange mennesker (...) så jeg kunne tænke på dagen i dag, og hvordan den ville blive. Det regnede lidt, men det gjorte ikke noget. Gik tilbage til hotellet og pakkede lidt sammen til den store dag, Klokken blev 10.30, og vi skulle til at gå op imod templet, jeg er begyndt at få sommerfugle i maven. (...) Klokken blev 11, og nu ringede alle klokker, der stoppede en bil lidt væk fra os, og jeg fik lidt kolde fødder, men Don hev mig med, Jang Shik "mother" løb imod mig og omfavnede mig, og da kunne jeg ikke lade være med at græde og hun hylede og talte på koreansk, hvilket jeg selvfølgelig ikke kunne forstå. Storebror og mig omfavnede hinanden og vi begge græd og snøftede, lillebror og jeg omfavnede også hinanden og græd ligesom før. Han er højere end mig og storebror lidt mindre end mig. Men hvor var Jung Shik "father"? Vi fik at vide, at han døde i april den 4., og der måtte jeg føle mig skyldig, er meget ked at at jeg ikke kunne møde ham (..)*

*Der blev filmet og taget billeder i lange baner, så stod vi og talte sammen om, hvor vi skulle gå, og hvilke planer vi havde for dagen (...) Jeg insisterede på at se, hvor Jung Shik blev begravet, og det fik jeg lov til, så efter at vi havde spist, kørte vi afsted. Det lå en times kørsel fra Seoul i de smukkeste omgivelser af bjerge, der var meget stille, vi gik op ad en bakke. (...) der var en præst med, så han bad en bøn, og efter det lagde omma en hånd på. Jeg tror, at hun talte og bad en bøn til appa og mig, men fik at vide fra min tolk, at hun ville have ønsket, at appa kunne se mig.*

*Tirsdag 12/9-2003*
*(...) Anna, en pige i gruppen skulle møde sin biologiske familie. Det havde hun fået at vide dagen efter, at vi var kommet til Seoul. Jeg skulle også møde omma (...) Mor, far, Terji og Ása tog tilbage til hotellet (...) vi tog så ud for at spise lunch med den anden piges biologiske forælder. Omma og den anden piges omma sad og talte om vores tøjstil, og at vi, som er opvokset i Europa var lidt tykke og måtte tabe os...*

*Lørdag 23/8-2003*
*Kære Hyo Shik!*
*Vi stod tidligt op, da de andre skulle ud i lufthavnen og være klar ved bussen klokken 9. Det tog en time at køre ud til lufthavnen, og der var min biologiske familie også og ventede på mig, og Annas biologiske forældre for at sige farvel. Det var en meget underlig følelse at vinke farvel til mor, far Terji og Ása. Jeg fik en klump i halsen. Vi stod der og vinkede, til vi ikke så dem mere. Så gik vi hjem til min biologiske mor og brødre, det var meget mærkeligt være sammen med dem og ikke forstå en skid af, hvad der blev talt om. Var så hjemme hos dem ved 16-tiden, det tog to timer at komme hjem. Der blev serveret mad med det samme, men jeg var ikke sulten - spiste en banan. Jeg tog et bad, og så skulle vi ud at spille pool og bowle, og så var der tid til at gå hjem til aftensmad. Efter det lejede vi tre videofilm. Phone Boot og 2 x Harry Potter. Klokken 24 var jeg træt og gik i seng.*

*Søndag 24/8-2003*
*Kære Hyo Shik!*
*Jeg stod op klokken 10.00. Da var brødrene og omma stået op, de havde morgenmad klar, jeg tog et hurtigt bad og så spiste vi. Vi skulle i kirke, min lyst til det var ikke stor, men jeg gjorte det alligevel. Der var mange mennsker som kiggede på mig, da jeg var en ny, som de ikke havde set før, men der var også nogle ind imellem, som jeg havde mødt (...) Præsten ønskede mig velkommen i kirken på engelsk, så jeg forstod en smule, og jeg blev lidt flov da ligesom alle hørte det, og det var i slutningen af gudstjenesten.*

*Vi skulle op på kontoret i kirken bagefter, da der skulle stilles nogle spørgsmål til mig fra præsten, men tolken, som var en pige, fnisede hver gang hun skulle sige noget. Vi satte os ned og så kom alle damerne som en flok og satte sig ved bordet, og jeg kunne forstå, at deres samtaleemne var mig...*

*Torsdag 28/8-2003*
*(...) Jeg er blevet totalt forelsket i Seoul, og synes at her er skønt at være, alt er bare fantastisk. (...)Vi sad og snakkede hjemme og drak kaffe, klokken blev mange igen og jeg skulle til at pakke og var hurtigt færdig med det, har sagt farvel til Tae Sung, da han ikke fik fri fra militæret, det var meget ærgerligt. Jeg har gjort klart til at sove og har stadigvæk ikke lyst til at rejse hjem igen.*

*Fredag 29/8 2003*
*Vejret er meget godt. Man kan se ned på byer og nu flyver vi forbi Bejing, Irkutsk, Ural Mountains og snart flyver vi over St. Petersburg og kan se byen, hvis det ikke er overskyet, så det håber jeg ikke. Jeg synes, at det er lidt underligt at sidde i flyet, og at det bliver ved med at være lyst. Hvis vi stadig var i Seoul ville klokken være 21.30, underligt at vi flyver væk fra mørket.*